Búskapur og vinna:

## Bíligar flogferðir

Írska flogfelagið Ryanair, sum er kent fyri sínar sera lágu prísir, ger nú aftur um seg.

Felagið hevur boðað frá, at tað er til reiðar at flyta fólk millum Oslo og Bodø fyri 364 norskar krónur umframt avgjøld, og tað er meiri enn eitt túsund krónur minni, enn ein tílíkur flogferðaseðil kostar í dag við flogførunum hjá SAS, Braathens og Widerøe. Ryanair flýgur sum er millum Noreg og Bretland og millum Noreg og Týskland, men vil fegið sleppa upp í norsku innanlandsflúgvingina.

Norski samferðslumálaráðharrin, Torild Skogsholm, sigur, at hon er til reiðar at skipa so fyri, at írska felagið sleppur at bjóða norskum ferðandi tær bíligu ferðirnar.

## Stórur áhugi

Meiri enn 44.000 fólk vóru á bátaframsýningini, sum hevur verið í Bella Centrinum í Keypmannahavn. Hetta er heldur meiri enn í fjør, og fyrireikararnir siga, at áhugin fyri stuttleikabátum er størri nú, enn hann hevur verið. Framsýnararnir siga, at alt fleiri og fleiri danir velja at halda summarfrí í egnum báti.

## Læna nógv

Norðmenn læna pengar sum ongantíð fyrr. Ein uppgerð vísir, at á nýggjárinum vóru tey privatu nýtslulánini í norsku peningastovnunum 240 mia. norskar krónur. Vøksturin hetta seinasta árið var 11 prosent.

Uppgerðin vísir, at lántøkan er vaksin hvønn einasta mánað í seinastuni, og at vøksturin er serliga stórur um summarið og um jóltíðir. Eitt nú sæst, at lántøkan seinasta summar var sjey milliardir krónur størri enn aðrar mánaðir, og í juli var hon eisini sjey milliardir krónur størri enn hinar mánaðarnar. Pengarnar nýta fólk til nýggjan bil, køk, hvítvørur, teldur og bátar.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísraelsmenn nýta nú eisini bumbur



*Ein ísraelskur hermaður hevur steðgað einum palestinskum hýruvogni við eina vegabyrging á Vestara Áarbakka*
*Mynd: Reuters*

**Gjáramorgunin sprongdi ein víðgongdur jødiskur felagsskapur eina bumbu uttan fyri ein palestinskan skúla**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Minst ein lærari og sjey skúlabørn fingu skaða, tá ein bumba brast uttan fyri ein palestinskan skúla í Eysturjerusalem gjáramorgunin. Blaðið Jerusalem Post visti at siga, at løgreglan hevði fingið boð frá einum víðgongdum jødiskum felagsskapi, at tað var hann, sum hevði skipað fyri spreingingini í skúlagarðinum. Í boðunum frá felagsskapinum stóð, at atsóknin var hevnd fyri tilburðin, tá tíggju ísraelsmenn doyðu í einari atsókn í Beit Yisrael seinasta leygardag, og at felagsskapurin fer at hevna øll ísraelsk børn, sum doyggja í palestinskum atsóknum.

Tey 600 børnini í skúlanum vórðu alt fyri eitt flutt burtur haðani. Stutt eftir funnu trygdarmenn tvær aðrar bumbur í kloakkini við skúlan, men tað eydnaðist at taka tær sundur, áðrenn tær brustu.

### Ófriðarligt

Dagurin í gjár var ógvuliga ófriðarligur. Tíðliga gjáramorgunin sprongdi ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður seg sjálvan í luftia í einum bussi har norðuri í Ísrael. Ellivu fólk fingu skaða.

Nakrar fáar tímar frammanundan skjeyt ein palestini fólk, sum, sótu á einari matstovu í Tel Aviv. Trý fólk doyðu, og minst 25 vórðu særd.

Eisini her var talan um hevnd, tí stutt eftir atsóknina boðaði tann víðgongdi palestinski felagsskapurin Al-Aqsa frá, at tað var ein av hansara limum, sum hevði skotið fólkini á matstovuni fyri at hevna, at ísraelski herurin hevði myrt kvinnur og børn í Ramallah og Jenin.

# Fara at stríðast til síðsta mann

**Al-Qaeda og Taliban-hermenninir, sum eru eftir har eysturi í Afghanistan, ætla sær at stríðast til síðsta mann**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Hóast amerikansk bumbuflogfør søkja at støðum teirra bæði dag og nátt, ætla Taliban-hermennini og stuðlar teirra úr Al-Qaeda ikki at geva seg yvir. Tvørturímóti boðaði ein av leiðarum teirra, Molvi Saifullah Mansoor, í gjár frá, at hann og hansara menn fara at stríðast til seinasta mann.

- Vit fara at berjast til tað síðsta ímóti USA, fyri æru islams og fyri at verja land okkara, segði kommandanturin við afghansku tíðindastovuna AIP. Hann legði afturat, at hann og menn hansara eru til reiðar at fara í deyðan heldur enn at enda í fongsli.

- Vit eru til reiðar at lata alt, og eg mæli øllum muslimum kring heimin at halda sínar muslimsku skyldur ímóti teimum vantrúgvandi, segði Taliban-kommandanturin.

### Dugnaligir

Seinastu dagarnar hava hermenn úr USA, Danmark, Noregi, Avstralia og Kanada tikið lut í einum álopi á støðirnar hjá Taliban og Al-Qaeda har eysturi í Afghanistan saman við afghanskum hermonnum. Men mótstøðan hevur víst seg at vera hørð, og higartil hava níggju amerikanskir hermenn latið lív í bardøgunum. Uppaftur fleiri afghanskir hermenn eru falnir.

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, segði mánakvøldið, at tað verður ikki lætt at basa Taliban og Al-Qaeda. Hann segði, at menninir vísa seg at vera væl vandir, teir eru væl vápnaðir, og teir kenna fjallalendið út og inn.

Rumsfeld var tó ikki í iva um, hvør fer at vinna bardagan, men hann ávaraði enn einaferð um, at tað fer at taka tíð, og at sigurin verður ikki ókeypis.

Úr Norðurlondum:

## Tær rýma

Meiningakanningar í Noregi vísa, at nógvar kvinnur venda Arbeiðaraflokkinum bakið. Bara góð tíggju prosent av kvinnum yngri enn 45 ár siga, at tær høvdu atkvøtt fyri Arbeiðaraflokkinum, var val nú. Sambært kanningini hevur flokkurin mist helmingin av sínum kvinnuligu veljarum hendan seinasta mánaðin.

Samstundis má Arbeiðaraflokkurin ásanna, at nú fáa tveir aðrir flokkar størri undirtøku millum norsku veljararnar. Kanningin sigur, at 22,5 prosent styðja Høgra, 22 prosent Framburðsflokkin og so 19,5 prosent Arbeiðaraflokkin. Hjá hesum seinasta er undirtøkan minkað tvey prosent eftir einum mánað.

## Á dyr

Tann umstríddi borgarstjórin í danska býnum Farum, Peter Brixtofte, hevur mist meirilutan í býráðnum, eftir at tveir av hansara floksfeløgum í Vinstra hava tikið seg úr meirilutanum. Avgerðin hjá teimum báðum fekk øði í Brixtofte, og eftir ein fund millum býráðsumboðini hjá Vinstra mánakvøldið gjørdi borgarstjórin ikki mætari enn at tveita annan teirra, Erik Fuchs, á dyr.

Teir báðir vinstramenninir mynda nú saman við andstøðuni meirilutan í býráðnum í Farum, men Peter Brixtofte hevur sagt, at hann er borgarstjóri, og at hann verður sitandi.

## Eldur í tunli

Eingin fekk skaða, tá eldur kom í ein buss í Valderøytunlinum uttan fyri Aalesund í Noregi gjáramorgunin. Løgreglan og bjargingarlið komu alt fyri eitt á staðið, og allir bilar, sum komu inn í tunnilin, fingu boð um at venda.

Valderøytunnilin, sum er undirsjóvartunnil, er næstan tríggjar kilometrar langur.




Skips Sosialurin
- TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK





Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982
ella e-mail: skipssosialurin@sosialurin.fo

☐ Tekst útgáva
☐ HTML útgava ( uttan útskrift )
☐ HTML útgáva ( við útskrift )

Sosialurin